# Ferð okkara kring knøttin

Á hesum báðum síðunum eru brot úr dagbókum frá okkara fjakkaraferð kring knøttin. Ferðin byrjaði í august og endar ávíkavíst í november og desember.

## FERÐAÆTLAN

Føroyar, Keypmannahavn, London, Los Angeles, Tahiti, Moorea, Rarotonga (Cook Oyggjarnar), Ný Sæland, Avstralia, Bali, Singapore, Maleisia, Teiland, London, Keypmannahavn og Føroyar.

**FERÐAFRÁSØGN – 2. PARTUR**

**Lagt til rættis:** Lív Højsted Horsdal,
horsdal@sosialurin.fo




**Navn:** Maria í Brekkunum
**Fødd:** 24.04.85
**Bústaður:** Eiði



**Navn:** Sissal Djurhuus Poulsen
**Fødd:** 01.05.85
**Bústaður:** Tórshavn



**Navn:** Rannvá Øssursdóttir
**Fødd:** 08.10.85
**Bústaður:** Tórshavn



**Navn:** Lív Højsted Horsdal
**Fødd:** 18.03.85
**Bústaður:** Hoyvík



## Ný Sæland

Dagurin í dag hevur bara verið tann VILLASTI.

Vit vaknaðu við kaldan dreym í morgun á sera harða og ísafrysta grasinum, teltið hjá okkum stóð á. Vit runnu á vesið og fingu hitan við fønaranum. Ja, okkurt máttu vit gera.

Løtu seinni var morgunmatur á skránni. Maturin hjá okkum er enn ok, hóast hann hevur ligið í einum kassa í okkara SpaceShip. – Ein bilur, sum hevur alskyns hentleikar. Uttan líkist hann einum rugbreyði, men innan er bæði dupultsong, køkur, dvd, fløguspælari, tvey sóltøk og um náttina kann bilurin gerast til eitt SpaceShip við klárum stjørnuhimmali. Men lika mikið við tí!...

Eftir morgunmatin fóru vit í mudbath - runubað og gosbað - har vit vórðu vaskaðar og skrubbaðar væl og virðiliga, hóast runa var allastaðni.

Vit sótu so fittar í heitum díki við runu upp um bæði oyru. Eg veit ikki, hvørjum vit líktust. Somuleiðis var eitt ísakalt bað á skránni. Spyr meg ikki hví, men tað skuldi so eisini verða ein partur av njótanini. Eftir eitt heitt brúsubað - hesu ferð við sápu - sótu vit aftur í bilinum og hildu fram við okkara road trip.

Vit settu kósina móti Taupo, ein lítil og hugnaligur býur í Ný Sælandi, sum tó er ov nógv merktur av ferðavinnuni. Men til sakina... FYRI LÍTLARI LØTU SIÐANI HAVA VIT SKYDIVAÐ. Trúgv tí ella ei, men vit hava lopið úr einum propellflogfari úr einari hædd á 12.000 føtur. Ella fyri at gera tað lættari – so næstan fýra kilometrar frá jarðarflatuni. Tað var bara ov vilt!

Um vit skulu vera heilt erligar, so høvdu vit iiiiilt í búkinum áðrenn, men juumspiiiibaaang... nú hava vit gjørt tað. Vilt, vilt, vilt og aftur vilt.

Áðrenn vit fóru, skuldu vit útfylla eitt skjal og síðan skriva undir. Aftan fyri pappirið var ymiskt at lesa um trygdina og vandan. Og tá vit skrivaðu undir, kendist tað júst, eins og vit júst høvdu skrivað okkara testamenti. Men hvussu var og ikki, so sótu vit lítla løtu seinni í pinkulítla flogfarinum.

Eg hugsaði: Hví ólukkan siti eg her? Hvat er hetta gott fyri? Og hvat skal eg prógva? Tað einasta svarið, eg kundi geva mær sjalvari var: Einki. Hetta gevur onga meining. Eg átti ongantíð at havt sett meg her í fullari mondering. Men har var eingin vegur aftur. Einasti vegurin niður aftur á jørðina var við høvdinum fremst út úr flogfarinum. Bókstaviliga í leysari luft.

Sissal var fyrsta 'offrið', og eg næst í røðini. Eg sá bara, hvussu grønari og grønari andlitið á henni varð. Hon rætti mær eina hond og sendi mær eitt undarligt eygnabrá, sum vildi hon siga: Takk fyri alt, hetta verður helst seinastu ferð, vit síggjast.

Við eitt fleyg hurðin upp á flogfarinum. Myndamaðurin hekk nærum í leysari luft, men krøkti seg í okkurt uttan á flogfarinum. 1-2-3 so hoyrdi eg eitt rimmar skríggj, og so var Sissal horvin út í luftina. Og áðrenn eg visti av, var tað eisini mín túrur. Eg fekk ikki tíð til at hugsa nakað sum helst. Eitt visti eg tó, og tað var, at áðrenn eg leyp, skuldi eg royna at anda inn so djúpt, sum eg kundi, so eg kundi halda ondini nog leingi, um tað fór at gerast ein trupulleiki at anda á túrinum. TJUBAAANG...so fór eg út. Runt, runt og runt og so við 250 kilometrum um timan niður aftur. Myndamaðurin royndi at fáa meg at vinka til tólið og tjums - 45 sekund seinni - fóru vit upp aftur.

Ljósareyði fallskermurin var komin út og riggaði. YES... nú var eg ikki so bangin longur, so seinastu 8 minuttirnar av turinum royndi eg bara at njóta framur vakra utsýnið, sum bráðliga lá framman fyri mær. Eg sá næstan alt Ný Sæland í einum.

Ná, men løtu seinni vóru vit allar longu niðri aftur. Eingin trupulleiki var at lenda við rumpuni fremst niður á grasið. Vit ímyndaðu okkum annars frammanundan, at beinini fóru at brotna av, tá vit skuldu lenda. Um vit altso nakrantíð fóru at koma niður aftur í heilum líki. Men eingin trupulleiki, sigi eg bara nú, vit í besta lag sita og drekka moccachino á einari café.

Eitt upplivilsi fyri lívið og allar tær 1400 krónurnar, sum tururin kostaði, verdar.



*Tað var sera kalt at sova í tjaldinum í Ný Sælandi. Um náttina frysti uttanfyri, so ullintu undirklæðini og hosurnar úr Føroyum komu veruliga til sín rætt.*



*TJUUBAANG, so fóru vit út. Runt, runt og runt og so við 250 kilometrum um tíman niður aftur á jørðina.*